## Tað gjørdist óneyðuga spennandi




*Sigurin kemur væl við, og moralurin er í toppi hjá okkum, staðfestir Pauli G. Hansen*

**Skála liðformaðurin heldur, at teir áttu at havt tikið spenningin burtur, áðrenn HB minkaði um munin og hótti við at javna**

SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Skála liðformaðurin Pauli G. Hansen var væl nøgdur við, at tað eydnaðist at fáa fulla úrtøku móti HB.

- Vit vóru sera vónbrotnir eftir steypatapið í Gøtu, og vit høvdu gjørt upp við okkum sjálvar, at avrikið móti HB skuldi verða betri, enn tað var móti GÍ. Og tað haldi eg, at tað var. Vit arbeiddu nógv og væl sum lið.Spælið hekk í løtum væl saman, og eg haldi, at vit høvdu fleiri málmøguleikar, enn teir høvdu. Vit áttu at havt skorað fjórða málið, áðrenn teir minkaðu um munin til 3-2. Tá gjørdist tað óneyðuga spennandi, heldur Skála liðformaðurin, sum eitt nú vísir á, tá ið Jónhard Frederiksberg lyfti upp um málverjan og dygst framvið málinum.

- Sigurin kemur væl við. Moralurin er í toppi. Tíverri varð Iulian Florescu skaddur. Tað var longu í steðginum greitt, at hann noyddist at fara út. Hann hevði fingið skaða í lærið. Bjarni Jørgensen kundi ikki spæla, tí hann var darvaður av trælæri, men hann verður ivaleyst tøkur mikukvøldið.

Hvussu gongur hjá Alexanduri Johansen?

- Hann hevur ikki enn verið og vant. Vit eru ikki greiðir yvir, nær hann verður førur fyri at spæla, men vit vóna, at tað verður skjótt. Tað hevur týdning at hava breiðan hóp, tá ið kappingin er long. Sveinur Justinussen venur nú hvørja ferð, og tað kemur væl við.

Hvussu langt fara tit at røkka í ár?

- Vit taka ein dyst í senn. Nú síggja vit fram til at fáa oddaliðið B36 á vitjan mikukvøldið.

Tú vart nógv skaddur í fjør. Hvussu hevur gingið við tí í ár?

- Eg skal ikki klaga. Onkrir smávegis snuddir hava verið, men tað hevur ikki darvað mær at spæla, sigur Pauli G. Hansen, ið er liðformaður hjá Skála, sum eftir sigurin á HB er næstfremst.

Skála-HB 4-3 (3-1):

# Gestirnir høvdu gl




**Skálamenn vóru sonn arbeiðsgrev, meðan fleiri í HB nýttu nógva orku til illneiting, og tá ið teir endiliga vóru um at fáa um endan, var kontravápnið hjá Skála teimum ov boysið**

FÓTBÓLTUR
*orð: Jóannes Hansen*
*myndir: Bárður Lydersen*

Intensiteturin var toppuppgerð verdugur, tá ið HB vitjaði á Skála. Stóran part av tíðini var Skála frammanfyri, men seinna partin av seinna umfarinum var um reppið, at HB fekk teir aftur. Í roynd undan lotinum at leggja trýst á fyri at javna, tveittu teir mest sum alt fólkið fram. Tveir minuttir undan leikloki spurdust tvey horna burturúr. Í fyrra førinum var um reppið, at bólturin fór í Skála málið, men hann varð beindur til nýtt horna.

Í seinna førinum megnaði heimaliðið at skovla bóltin út úr brotsteiginum. Jónhard Frederiksberg setti ferð á, kapprann við HB verjuna, men varðveitti samstundis yvirblikkið, spældi í høgra borð til Boga Gregersen, sum rak eitt sindur og spældi fram í høgru til innskifta og raska Róa Jacobsen, sum legði flatt í brotsteigin, hagar Jónhard Frederiksberg var komin.

Tá ið hann við innaru síðuni smekkaði upp undir nettakið, var um reppið, at takið fór oman av innara partinum av nýggja skýlinum. Málið tryggjaði Skála øll stigini, og so nyttaði tað HB einki, at trífaldi málskjúttin hjá teimum, Rasmus Nolsøe, við rimmar sparki sendi í kassan í evstu løtu av nógv longdu leiktíðini, sum Lassin Isaksen hevði lagt afturat, tí heimaliðið í 2. hálvleiki hevði døllað sær so nógv.

Sjey mál boða frá undirhaldi, og tað er harafturat merkisvert, at flestu málini vórðu skorað í sambandi við deyðbóltsstøður.

### Heimamenninir betur upplagdir

Serliga í 1. hálvleiki, tá ið Skála hevði nógva vindin undan, var høgættin ikki blíð. Spælið var darvað, og HB hevði meiri enn ilt við at fáa tingini at hanga saman. Skálamenninir vóru nógv meiri avgjørdir og sannførandi í nærdystunum. Onkur á HB liðnum var mest sum blindur ferðamaður, og einir tveir lyklaspælarar tóktust hugsa meiri um at illneitast inn á liðfelagarnar og serliga dómaran, ið hevði torføra uppgávu, enn at spæla og serliga stríðast, sum tað var alneyðugt at gera.

Stóri maðurin á heimaliðnum var miðvallarin Pauli G. Hansen. Liðformaðurin gekk undan í stríðnum, hann bakkaði væl upp, fangaði eina ótrúliga rúgvu, og so megnaði hann saman við Nenad Stankovic, Pæturi Dam Jacobsen og Hanus Thorleifsson miðvallaruppgávurnar væl betri enn HB miðvøllurin, har Kári Nielsen var einsamallur um at vísa tað, sum eigur at kunna roknast við av meistaraliði.

HB verjan var orsaka av kynkinum á miðvøllinum undir stórum trýsti, og málverjin hevði trupulleikar í 1. hálvleiki. Skála fekk hol á, eftir at HB í vinstra verjuborði hevði givið óneyðugt innkast. Tað varð tveitt inn í málteigin, og eftir tvær ferðir aftur og fram sendi miðverjin Rúni Rasmussen upp í málhornið.

Einasta HB hóttanin var